# Ein bersøgin Beth Hart



**Tað var ein væluppløgd Beth Hart sum trein á pallin á sandinum í Syðrugøtu. Hon var eitt av høvuðsnøvnunum, og tað sást eisini aftur á áskoðarunum, at tey høvdu glett seg at hoyra hesa songkvinnu. Og hennara partur lá ikki eftir.**

G!FESTIVAL
*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

Tað er ófatiligt at síggja Beth Hart. Hvussu kann eitt menniskja hava eina so kraftiga rødd? Hennara rødd darrar enn í mínum oyrum. Og hon er ikki bara kraftig. Hon er rá og ópolerað. Talan er um eina kvinnu, sum hevur livað eitt hart lív, og tónleikurin ber eisini brá av hesum. Tónleikurin er erligur og harður, og hesum tóku føroyingar væl ímóti.
Tað er ongin ivi um, at Beth er stjørnan í bólkinum. Hon er faktiskt tað einasta sum ger bólkin áhugaverdan. Tónleikararnir sum hon hevði afturat sær, vóru rættiliga vanligir, um ein kann siga so. Eftir mínum tykki, spældu teir rættiliga óáhugavert, og vóru ógviliga vanligir uppá tann keðiliga mátan. Um hon hevði havt meiri spennandi tónleikarar afturat sær, hevði konsertin verið lyft fleiri klassar longur upp. Men tó megnaði Beth Hart at bera alla framførsluna væl og virðiliga.

**Bersøgin**
Hon so sanniliga eisini bersøgin. Hon nýtti fleiri ferðir høvi at siga sína hugsan um sitandi forsetan í USA. "Bush is on my shit-list", segði hon so rámandi. Og tvey løg vóru eisini beinleiðis ognað honum. Hetta dámdi áhoyrarunum heilt væl. Sostatt kann ein roknað við, at demokratarnir í USA eru vælumtóktir í Føroyum. Tí har var øðiligur rómur, hvørja ferð Beth Hart segði eitthvørt ókvæmisorð um Bush-leiðsluna.
Eisini greiddi hon frá søguni aftanfyri "LA Song", sum er eitt av hennara heilt stóru hittum. Lagið snýr seg um hennara parlag við ein drong úr Alabama, sum var henni ótrúgvur. Sum hon greiddi frá, so valdi hon at skriva ein sang til hansara heldur enn at: "buka damuna og brenna hansara hús til grundar".
Tað var ikki fyrr móti endanum, at Beth Hart treiv í hennara kendasti løg. "LA Song", "Leave The Light On" og "I´m Learning To Live" vórðu spæld út í eitt. Endiliga sluppu áhoyrararnir at syngja við, og tað dámdi teimum eisini væl. Hesi trý løg vóru eisini hæddarpunktið á konsertini.
Beth Hart gav okkum eina stóra uppliving. Hon dugdi sera væl at framføra, og serliga gjørdist fólk vill, tá hon knappliga leyp av pallinum og sang, meðan hon rann millum fjøldina.

Beth Hart vann nógv hjørtu hetta leygarkvøld í Syðrugøtu.

## tað einasta erliga, ið er eftir í tónleikaídnaðinum

var nakað av tí, ið henni dámdi verst við tónleikaídnaðinum.
Hetta breyt mestsum ísin, og restin av tíðindafundinum, gjørdist eitt slag av hugnaligum túnatosi, har hon spurdi eins nógv okkum tíðindafólk um ymiskt, sum vit spurdu hana. Sjálvt tá hennara pressutalsmaður endaði fundin, helt Beth Hart fram við at spyrja um ymiskt, hendurnar, ið ristust heldur nógv í byrjanini av fundinum, vóru nú heilt róligar, og tað tyktist sum um, Beth Hart hevði funnið frið við føroyska tíðindaheimin. Meðan henni vanliga ikki dámdi tíðindafundir, so vóru konsertir harafturímóti tað, ið henni dámdi allar best. "Konsertir er tað einasta erliga, ið er eftir í tónleikaídnaðinum, tá eg fari í upptøkuhølið, kann eg spæla okkurt umaftur og umaftur, til tað situr heilt rætt, hetta er fínt, einki galið við tí. Men tá eg spæli konsertir, so fær fólk tað, sum tað er. Onkuntíð er tað gott, onkuntíð ræðandi, onkuntíð ræðuligt og onkuntíð undurfult, men tað er altíð erligt." greiddi Beth Hart frá.
Beth Hart segði, at hóast hon hevur ferðast kring allan heim, so hevur hon ongantíð vitja eitt stað sum Føroyar, so grønt, klettarnir og tann nógvi seyðurin, eitt tílíkt stað hevði hon ongantíð sætt áður.
Hon greiddi frá, at henni dámdi so serliga væl at spæla á festivalum. Har er møguleiki, at hoyra so nógvan ymiskan tónleik, og hitta so nógv ymisk fólk. Eitt nú vóru konsertirnar við Animal Alpha og Kaizers Orchestra góðar, helt hon. Aftan á konsertina við Animal Alpha hevði Beth Hart kent seg sum ein veruligan fjeppara, tá hon hevði bønað Agnetu Kjølsrud songkvinnuna í bólkinum um at koma til USA og vísa fólki, hvussu tað skal gerast.
Beth Hart er eitt munandi størri navn í norðurlondum enn hon er í heimlandinum, vit spurdu hana, um hon hevur hóming av hví so er? Hetta visti hon ikki, og helt tað vera trupult at siga ella spáa um, hvat riggar í hvørjum landi og hví, men helt, at her var møguliga bert talan um hepni.


Mynd: Ólavur Frederiksen